## Forðingar hjá kvinnum í politikki

Mikukvøldið klokkan sjey verður almennur fundur á Parnassinum á Hotel Hafnia. Tað er Javnstøðunevndin og Demokratia, sum er nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki, ið skipa fyri.

Og spurningurin, sum er til viðgerðar á hesum fundi, er, hvat forðar kvinnum at vera við í politikki.

Á hesum fundinum fer Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í Demokratia, at siga frá nevndararbeiðinum higartil og framtíðarætlanum. Eisini verður búmerkið hjá Demokratia lagt fram. Aftaná fara granskararnir, Beinta í Jákupsstovu og Eli Kjersem, at leggja fram úrslit frá spurnakanning ímillum tey, sum vóru uppstillað til kommunuvalini í 2000 og 2004, við serligum atliti til kvinnuumboðan. Í hesi framløguni fara tær at vísa á nakrar forðingar hjá kvinnum í at vera við í politikki, og á nøkur stig, sum kunnu takast fyri at fáa fleiri kvinnur at stilla upp og verða valdar.

Eisini hesin fundurin endar við kjaki og einum kaffimunni.

áki



*Eyðgunn Samuelsen fer at greiða frá framtíðarætlanini hjá demokratia-nevndini a almennum fundi á Hafnia í Havn mikukvøldið*

# Torført at siga um tað fær týdning

**Nú er olja funnin tætt við hjá føroyska oljufelagnum, Atlantic Petroleum. Stjórin heldur, at sjálvandi er hugaligt, men veit kortini ikki, hvat tað kann merkja**

Nú um dagarnar bórust tey tíðindi, at stórar oljunøgdir eru funnar í Golden Eagle oljuleiðini í bretska partinum í Norðsjónuim

Hetta økið er tætt við Ettrick- oljuleiðina, sum er størsta virkisøkið hjá føroyska oljufelagnum Atlantic Petroleum.

Eygleiðarar eru varnir, men teir meta, at hetta kann merkja, at meira olja er á Ettrick-leiðini, enn tey higartil hava hildið.

Eisini Vilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum heldur, at tað er ov tíðliga at siga nakað um, hvønn týdning, hetta kann fáa.

Hann hevur sjálvandi hoyrt tíðindini, men kennir ikki so nógv til tey annars.

Men tað er greitt, at verður Golden Eagle-oljuleiðin tengd at Ettrick, kann hetta fáa stóran týdning fyri okkum, sigur hann.

- Hetta liggur tætt við okkara øki og tað er sjálvsagt áhugavert, at olja er funnin í grannalagnum, sum hann tekur til.

Eygleiðarar meta, at nú olja er funnin í Golden Eagle, er eisini sannlíkt at olja er í Ettrick og tað kanska í størri nøgdum enn higartil mett.

Kanningar higartil hava annars bent á, at einar 50 milliónir tunnur av olju eru á økinum, og við dagsins prísi eru tær verdar næstan 15 milliardir krónur

Parturin hjá Atlantic Petroleum í Ettrick økinum 8,27%.

Men tíðindini um, at olja er funnin í Golden Eagle, hava givið partabrøvunum í Atlantic Petrolum eitt kvink uppeftir.



*Børnini vóru forvitin og hugnaðu sær óført í Vágsbotni seinnapartin sunnudagin. Og so var málið rokkið, tí ætlanin var júst, at hetta skuldi vera ein hugnaløta, umen ein heldur øðrvísi av slagnum*

# Fingu alt møguligt upp av Havnarvág

**Kavarar fingu nógv ymisk dýrasløg upp av Havnarvág sunnudagin og serliga børnini hugnaðu sær óført í Vágsbotni sunnudagin**

HUGNALØTA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tey spurdu beinanvegin, nær tað verður aftur.

Karl Robert Vang, formaður í froskmannafelagnum í Havn er vælnøgdur við tiltakið hjá felagnum sunnudagin.

Tað var á miðdegi sunnudagin, at einir 10 kavarar løgdu frá landi ymsastaðni rundanum Havnina. Ørindini vóru at leita eftir dýrum á Havnarvág at vita, hvussu mong sløg, teir kundu fáa við sær aftur til lands.

Og klokkan 15 sunnudagin, bar til hjá øllum áhugaðum at síggja fongin niðri í Vágsbotni, har øll dýrini vórðu slept livandi í kørini, sum tey plagdu at selja fisk og fugl í, men sum vórðu fylt við sjógvi og sandi til hetta serliga høvið.

Har var rættiliga fitt av fólkið komið saman at hyggja og tað var eisini nógv at hyggja at.

Har vóru bæði kúvingar og krabbar, skrubbur og reyðsprøkur, sjómýs og krossfiskar í ymsum støddum og litum og annað.

Tað skerst ikki burtur, at serliga børnini hildu hetta vera forvitnisligt og tey stuttleikaðu sær óført at fanga tey ymsu dýrini – ella bara nema við.

Aftaná fekk akvariummið á Argjum øll dýrini og so vórðu tey dýrini tikin frá, sum áhugi var í og so skuldi restin sleppast aftur í havið.

At fólk longu spurdu, nær tað verður aftur, tekur formaðurin sum eitt tekin um, at tað var vælydnað.

# Kunnu brúka bilin at finna húsini við

**À vestara armi á Skálafirði er bara at telja, tí ongastaðni eru so nógv húsanummur sum á teimum fýra bygdunum**

HÚSANUMMUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ongastaðni í Føroyum eru so høg húsanummur sum á Selatrað.

Tað vísir ein uppgerð, sum Matrikkulstovan hevur gjørt.

Á Selatrað kanst tú koma at búgva á Selatraðarvegi 895 og so høgt uppi eru húsanumrini ikki nakra aðrastaðni í landinum.

Yvirhøvur eru húsanumrini sera høg í bygdunum á vestara armi á Skálafjørðinum. Sostatt kann eisini onkur á Morskranesi eisini búgva á Selatraðarvegi 496 og á Strondum kann onkur búgva á Strandavegi 375. Og á Skála kann onkur búgva á Skálavegi 361.

Suðuroyingar fylgja eisini eitt sindur við, tí har er ein bústaður á Froðbiarvegi 308.

Í Havnini, har mesta fólkið býr, sleppur ongin longur upp enn tey, sum búgva á Berjabrekku 208.

Matrikkulstovan sigur á heimasíðuni, at orsøkin til høgu húsanumrini á vestara armi á Skálafirði, er, at har eru vegirnir merktir við húsanummari fyri hvørjar 10 metrar.

- Ein fyrimunur við hesum er, at skalt tú finna Selatraðarveg 895, kanst tú stilla teg við bilinum á Raktanga, har Selatraðarvegur byrjar og stilla tippteljaran á null.

- Tá ið tú so hevur koyrt 8950 metrar, stendur tú uttanfyri Selatraðarveg 895, sigur Matrikkulstovan.

*Á Vestara armi á Skálafirði hava tey sett eitt húsanummar fyri hvørjar 10 metrar og so kanst tú finna húsanummari við bilinum.*

